Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



Tekniski Skúlin, Tórshavn:

# Plátu- og konstruktiónssmiðir úr Vági fingið prógv



*Fríggjadagin 6. februar fingu fýra plátu- og konstruktiónssmiðir prógv á Tekniska skúla í Havn. Felags fyri allar fýra er, at teir eru úr Vági og hava lært hjá Injector Door í Vági. Teir eru: f.v. Finnbogi Magnussen, Jóhan Sofus Müller, Napoleon Danberg, Vermund Vestergaard.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Heðin Kambsdal í Galerie Focus



*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fríggjadagin 6. februar lat Heðin Kambsdal upp framsýning í Galerie Focus í Havn.**

Heðin er føddur í 1951 í Fuglafirði og er útbúgvin lærari. Hann er eisini urguspælari og undirvísir m.a. í tónleiki. Sum myndlistamaður er Heðin sjálvlærdur. Hann sýnist at vera inspireraður av amerikanska listamanninum Edward Hooper (1882-1967) sum ofta málaði stórbýarmyndir, hús og fólkatómar gøtur.

Heðin hevur m.a. prýtt gongina í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, møtisalin í Horbelev prestagarði á Falster og Føroya Banka í Fuglafirði. Hann hevur havt framsýningar í Føroyum og í Danmark.

Framsýningin verður opin til 20. februar, týsdagfríggjadag frá kl. 14-18 og leygardag frá kl. 16-18.


## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran ...**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:...............................................
Bústaður:...............................................
Bygd/býur:..............................Tel:...................
Evt. arbeiðspláss:...............................................

Merkisdagurin er: ...............................................

Innsendari: ..............................Tel:...................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 341800/216135, fax 341801, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo




NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



## Jákup Joensen 85 ár

Í gjár fylti Jákup Joensen í Klaksvík, vanliga róptur Jákup á Ternuni, 85 ár. Tað, sum Jákup helst er kendastur fyri, eru hansara smáu, men stuttligu viðmerkingar, sum altíð fingu láturin at runga, tá hann kom at krevja pening frá ferðafólkunum

Jákup er sonur Malvinu, f. Steffensen úr Árnafirði og Jákup Joensen, bónda í Gerðum í Klaksvík.

Hann er giftur Steinvør, dóttir Olevinu og Heina Heinesen úr Kunoy. Tey eiga 3 børn. Leivur, giftur Áslu við Keldu í Klaksvík. Ingun gift Martin Jacobsen úr Vatnsoyrum og Anna Maria, gift Pól Poulsen úr Ljósáum. Næstelsta barnið, Heini føddur í 51, doyði bert 9 mánaðar gamal.

Abbabørnini eru 6 í tali, Steinvør, Theodor, Jákup, Sigmund, Andrias og Andru. Lítla langabbadóttirin eitur Rebekka Fonn.

Í nøkur ár sigldi Jákup við fiskiskipum, til hann í 1948 byrjaði at sigla við posti fyri Hugo Gardar. Har var hann til 1970, tá hann fór at sigla við Ternuni um Leirvíksfjørð.

Jákup er av arbeiðssamastu monnum. Hann er kendur fyri at verða framúr kvikur maður, og á fjalli kom eingin honum nær í hegni og skjótleika.

Í sjómansskapi er hann millum teir frægastu. Hann var sera hegnigur og legði nógv fyri, tá tað galt um at fáa post og vøru í land á brimplássum. Nógv eru tey, børn og kvinnur, ið hava fingið hjálp og troyst frá Jákupi, tá sjóverkur og ótti gjørdu um seg.

Eitt av talentunum, Jákup fekk í vøggugávu, eru evnini at gera stuttligar viðmerkingar. Ta gávuna hevur hann ikki grivið niður, men gevur av henni til gleði fyri øll, sum koma á hansara leið.

Tann 23. oktobur 1966 var ógvusligt brim í Leirvík. So stór vóru óløgini, at tey tóku bilarnar sum svávuleskjur út á sjógv. Ein maður var í einum av bilunum, men hann varð tíbetur bjargaður. Nakað eftir hendingina, skrivar Kristan á Bakka soleiðis í Dimmalætting:

"*Eg stóð og hugdi at, tá óløgini komu. Tað var eitt satt Guds undur, at eingin mansskaði varð. Eg kann, sum eldri maður her á plássinum, siga so mikið, at tað var eitt vágaverk fyri skip og ferðafólk at royna at bjarga manninum úr bilinum, meðan hann fleyt. Tað var eitt satt manndómsbragd av skiparanum, Jákupi, sum greiddi at bjarga manninum og koma so væl frá tí.*

*Er nakað heiðurstekin fyri bjargan av mannalívi, so meini eg avgjørt, at Jákup hevur tað uppiborið.*"

Tað kundi verið mangt at skriva um ein merkismann ein merkisdag. Men vit lata vera nóg mikið hesaferð og ynskja føðingardagsbarninum hjartaliga tillukku við degnum og Harrans signing á lívskvøldinum.



*Í gjár fylti Jákup Joensen í Klaksvík 85 ár. Mong minnast Jákup frá tíðini, tá hann sigldi við Ternuni um Leirvíksfjørð. Við sínum lætta og skemtingarsama lyndi, fekk Jákup altíð láturin at runga millum ferðafólkini*

## Rani Wardum 25 ára starvsdag



1. februar 2004 hevði Rani Wardum politistur í Havn 25 ára starvsdag. Rani er 46 ára gamal og havnarmaður.

1. februar 1979 gjørdist hann politistanæmingur. Eftir lokna útbúgving varð hann settur sum politistur í Havn.

Hann var politistur í Århus frá 1. februar 1987 til 1. juni 1989, tá aftur bleiv settur sum politistur í Havn.




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin


## Brynhild Djurhuus 60 ár

Mánadagin 9. februar fylti Brynhild Djurhuus á Sendistovu Føroya í Keypmannahavn 60 ár.

Brynhild er úr Vági, dóttir Ragnhild, f. Nicodemussen, ættað úr Skálavík og Andreas Djurhuus, ættaður úr Porkeri.

Hon tók preliminerprógv í Vági í 1960, og varð útlærd sum skrivstovukvinna í 1963. Hon stóð í læru hjá P/F Shell á Viðarnesi í Havn.

Hon hevur m.a. arbeitt á Fornminnissavninum 1970-80, á Dansk Sygeplejeråd Føroya deild 1980-85 og á Sendistovuni frá 1985. Hon hevur eisini merkonomútbúgving.

Brynhild eigur tríggjar døtur: Dagny er sjúkrasystir og arbeiði sum narkosusjúkrasystir á Odense Universitetshospitali, hon er gift við Viggo Joensen úr Havn. Anna arbeiðir sum barnagarðspedagog, hon er gift við Páll Arge úr Havn, tey búgva í Asserbo og hava eisini "Asserbo kro", yngsta dóttirin, Kára, lesur á Københavns Universitet.

Brynhild eg í dag gift við Niels Christiansen.



### Dagurin

**10. februar. Scholastica**, deyð umleið ár 542. Tvíburasystir Sankta Bænadikt úr Nursia sum stovnaði eina munkaskipan, ið skjótt kom víða um lond.